


# Álmanakkin metseljari

**Hann kom út fyrstu ferð í 1928 og liggur í løtuni sum nummar eitt á metseljaralistanum hjá Bókasøluni. Væl umtókti Álmanakkin er ein áhugaverd útgáva av føroyskum mentanararvi í modernaðum hami**

ÁLMANAKKIN

Seinnu árini hevur gamli Álmanakkin, sum flestu føroyingar munnu kenna, fingið eitt alsamt meir modernað snið. Ritstjórin, Erling Isholm, dylur ikki yvir, at hetta kemst av, at kappingin við hetta slagið av útgávu er harðnað seinnu árini. Hinvegin sær Erling tað framvegis sum sína týdningarmiklu uppgávu at varveita tann siðbundna partin av Álmanakkanum, eitt nú gomul mát og dagaheiti, sum kunnu vera torfør at finna aðrastaðni.

### Aftur til Føroyar

Álmanakkin kom út fyrstu ferð í 1928, og var hann fyrsta prentuppgávan hjá prentstovuni í HNJ Bókahandli. Vaksandi krøvini til prentið gjørdu tó, at prentingin sum frá leið varð flutt uttanlands. Álmanakkin 2006 er sostatt tann fyrsti í fleiri ár, sum er prentaður í Føroyum, og er tað Føroya Prent, sum nú hevur uppgávuna um hendi. Álmanakkin verður prentaður í 5000 eintøkum, og man tað uttan iva verða størsta upplagi av slíkum slag í Føroyum.

Umframt upplýsingar av meir almennum áhuga, so sum hagtøl, yvirlit yvir stovnar, fólkanavnalistan a. o., vendir Álmanakkin sær sum vant til vinnuna á sjógvi og á landi. Í fyrsta parti er m.a. sjálvur álmanakkin, yvirlit yvir sól- og mánastøður í árinum og tað, sum vert er at vita um gongustjørnur og annað á himmalhválvinum í 2006. Síðani koma nógv nýttu streymkurvarnar, talvan við vestfalskyrrindunum og streymkort saman við lista yvir motorbátar undir 20 tons. Listin við skipum yvir 20 tons er aftur í ár prýddur við myndum av skipunum. Í hesum pørtunum eru sum vant nógvir aðrir hentir og dagførdir upplýsingar av alskyns slagi til sjóvinnuna.

Tilfarið um landbúnaðin, alivinnuna og oljuvinnuna er eisini dagført, og tað eru nógvu hentu upplýsingarnir aftast í álmanakkanum sjálvandi eisini.

**ave**

# Eingi jól uttan Leikhúsjól

LEIKHUSJÓL

Allan jólamánaðin á tamb hevur lív og góður rómur verið í Sjónleikarahúsinum í miðbýnum í Havn. Vøkru ljósperurnar, stóri jólamaðurin úr træ og mongu uppsløgini, ið prýða húsini, benda á, at jólini eru byrjað í Sjónleikarahúsinum og at Leikhúsjól eru á skránni.

Eins og undanfarin ár hevur Sjónleikarahúsið í Havn aftur í ár boðið børnum sum gomlum til Leikhúsjól. Í Sjónleikarahúsinum gera tey vanliga nógv burtur úr hesum tiltaki.

Í ár er tað navnframa og ikki minst dugnaliga Elin á Rógvu, ið bæði hevur skrivað handritið og leikstjórnað Leikhúsjólunum 2005. Elin á Rógvu hevur eftir hondini sett nógvar sera væl umtóktar barnaleikir á pall - t.d. "Kúlla Knút" og "Fólk og dólgar í Kardamummubýnum" - og Leikhúsjól í ár bera eisini brá av hennara skilagóðu, skemtiligu og góðu uppsetingum.



### Mýs, fittar nissur og harðir dreingir

Leikhúsjól í ár snúgva seg um tríggjar mýs, ið tíverri eru noyddar at flyta úr Sjónleikarahúsinum eftir at hava búð har í mong harrans ár. Mýsnar mugu flyta av teirri orsøk, at gamla loftið í salinum, har tær altíð hava búð, brádliga varð tikið niður. Nú er tað opið upp undir tróðrið, og mýsnar eru heimleysar, og eru tær rúkandi óðar inn á leiðsluna í Sjónleikarahúsinum um hetta. Nú mugu tær út í óvissuna, ið valdar uttan fyri Sjónleikarahúsið, har bilar, hundar og onnur gera teimum ónáðir. Men mýsnar eru ikki so tollutar, sum tær kanska tykjast. Við hjálp frá fittum nissum, ið duga væl at syngja, finna tær upp á ráð, soleiðis at tær kunnu verða verandi í besta heiminum í verðini - Sjónleikarahúsinum.

### Hugnalig Leikhúsjól

Ikki er tað pláss fyri so nógvum áskoðarum til hvørja sýning, men hetta ger tað eisini hugnaligt. Stólarnir eru settir á serstakan hátt í tveimum røttum røðum, ið møtast á miðjuni - í vinkul. Og leikararnir spæla á gólvinum, har áskoðararnir sita, og eru alla tíðina bert góðan metur frá fremstu áskoðarunum. - Júst hetta ger sýningina meiri livandi og áhugaverda. Jólaleikurin varir í umleið trý korter og er á tann hátt ein hóskandi stuttur leikur fyri børnini.

### Væl vitjað

Í flestu førum hava Leikhúsjól verið væl vitjað, og soleiðis hevur tað eisini verið í ár. Útselt hevur verið at kalla til allar sýningarnar, og hóast tey í Sjónleikarahúsinum longu fyrst í vikuni lýstu við útseldum eykasýningum, gongur telefonin í húsinum enn heit, siga tey.




